# Blómuhandil í Ribarhúsi

Leygardagin læt Blómuhandilin Summardáin upp framsýning í Ribarhúsi í Fuglafirði. Á framsyningini verður ymiskt innan blómubinding, hugna til heimið, Keramik og annað at síggja. Framsýningin í Ribarhúsi er opin fram til 4. november mánadag til fríggjadag frá klokkan 15-17.30 og leygardag 11-14..



# Gentuleikluturin í myndbókum

Í kvøld klokkan 20 fer Marna Jakobsen at halda fyrilestur við heitinum "Tá býflugan kom til Føroya". Fyrilesturin snýr seg um gentuleiklutin í føroyskari myndbókaskriving og tekur støði í myndbókini Trøllalív eftir Elin Bjørg Højgaard. Bókin kom út fyri 30 árum síðan, og áhugavert er m.a. at vita, um kynsleiklutirnir eru stereotypir, og um vit við at kaga í myndbøkur fyri børn kunnu lesa okkurt samfelagsligt burtur úr teimum. Hvussu er vorðið við myndbókum, ið eru útkomnar hesi 30 árini? Eru leiklutirnir broyttir? Eru teir ikki – og hví man tað vera, um so er? Kvinnufelagið skipar fyri tiltakinum, sum verður í Mettustovu í Havn. Øll (ikki bara allar!) eru vælkomin, og høvi er eisini at tekna seg sum lim í felagnum.

# Martin heiðraður í heimbygdini

Herfyri fekk sang- og tónasmiðurin, Martin Joensen, handað M. A. Jacobsen virðislønfyri fagrar bókmenti.

Sunnukvøldið heiðraði Vestmanna kommuna Martini Joensen á Fjørukrónni, har ein rúgva av fólki var komið saman at feira bygdamannin, sum sjálvt um hann býr í Havn, onkursvegna altíð hevur heimbygdina við í skaldskapi sínum.

Formaðurin í mentanarnevndini, Pauli P. Petersen, bjóðaði vælkomini, borgarstjórin, Karl Olsen, helt røðu og teir báðir handaðu skaldinum ein málning av Gunnari Streymoy, ið myndaði kenda lagið »Svarti ravnur«, sum Martin Joensen hevur gjørt orð og lag til.

Her eru nakrar myndir frá móttøkuni í gjárkvøldið klokkann 19, har Martin Næss, landsbókavørður og vinmaður Martins, eisini segði nøkur orð.

*Myndir: Hilbert Elisson*



*Martin Joensen í miðjuni, saman við Eyðun Hansen og Paula Magnussen*



*Nogvir vestmenningar vóru komnir á Fjørukrónna at heiðra Martin Joensen*



*Martin Joensen fær handað gávu frá Vestmanna kommunu, sum er ein málningur eftir Gunnar Streymoy, ið avmyndar Svarta ravn*

# Fyrilestur um trivnaðin í skúlanum

**Í Vestmanna verður ein áhugaverdur fyrilestur um happing og trivnað hjá børnum**

Í samband við at ársfrágreiðingin hjá Vestmanna Skúlastýri skal leggjast fram fyri foreldrum og lærarum í Vestmanna Skúla, verður skipað fyri almennum, áhugaverdum fyrilestri í Aulunu í Vestmanna Skúla 23. oktober klokkan 19, har Anna Dalsgaard trivnaðarráðgevið greiðir frá.

Anna Dalsgaard er júst komin aftur til Føroya eftir eitt ár í Danmark, har hon hevur skúlað seg innan arbeiðið við trivnaði og sosialari førleikamenning í skúlum og dagstovnum. Anna bjóðar seg fram til skúlar og dagstovnar at gera ítøkiligar mannagongdir í sambandi við trivnaðar- og antihappingararbeiði, ráðgeving og vegleiðing í trivnaðararbeiði við børnum og ungum í barnagarði og skúla, aktivt arbeiði við sosialum trivnaði í skúlaflokkum, við sosialari førleikamenning í barnagørðum og skúlum, í happingarfyribyrging. Vegleiðing og ráðgeving í at steðga happing, og aktivt arbeiði í skúlaflokkum, har happing er. Eisini heldur hon fyrilestur í evnum innan trivnaðarøkið fyri lærarum, pedagogum, foreldrum og øðrum áhugaðum.

Evnið ið nomið verða við eru millum onnur: Hvønn leiklut vit sum foreldur hava, tá ið tað snýr seg um trivnaðin hjá okkara børnum í skúlanum. Hvussu lesi eg av um barn mítt er happað ella um tað happar? Hvat kann eg gera? Hvat kunnu vit sum foreldrabólkur gera?

Anna Dalsgaard er útbúgvin lærari av N. Zahles seminarium í Danmark, hon hevur pedagogiska diplomútbúgving í sálarfrøði av Danmark pedagogiska universiteti, hjágrein í ítrótti (exam. scient) av Odense universiteti, skeið í konfliktmekling, sosialari førleikamenning, anti-happing og trivnaði, drúgvar royndir sum lærari í serskúlum og fólkaskúlum í Keypmannahavn og Føroyum, umframt eitt ár námsuppihald í Danmark, Svøríki og Noregi í skúlum og dagstovnum, sum raðfesta trivnað høgt.



*Anna Dalsgaard er trivnaðarráðgevi, og hon fer at tosa um trivnaðin í skúlanum og um, hvønn leiklut foreldur hava, tá tað snýr seg um trivnaðin hjá børnunum*